



# Kvinnuligir prestar uppliva mótgongd

**Næstan 60 prosent av kvinnuligu prestunum í donsku fólkakirkjuni hava upplivað, at mannligir prestar hava roynt at arbeitt ímóti teimum. Summar eru beinleiðs sjikaneraðar**

JAVNSTØÐA
*Eyðun Klakkstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ein kanning, sum danska blaðið Politiken hevur gjørt millum kvinnuligar danskar prestar, vísir, at næstan 60 prosent av teimum hava verið úti fyri, at mannligir starvsfelagar hava sagt teimum, at tær egna seg ikki at verða prestar, tí tær eru kvinnur. Ein stórur partur av kvinnuligu prestunum hava upplivað hetta fleiri ferðir ígjøgnum teirra tíð sum prestur.

Sambært Politiken halda kvinnuligu prestarnir, at tað er ein lítil minniluti av mannligum prestum, sum halda at kvinnur ikki skulu vera prestar, og tað eru hesir prestar, sum stundum royna at mótvirka teimum kvinnuligu prestunum.

- Fleiri av mínum mannligu starvsfeløgum vildu ikki nerta somu Bíbliu og altarbók sum eg, tí teir hildu, at eg dálkaði tær, sigur Berit Børresen, sum er prestur í Draaby sókn.

Onkur av teimum kvinnuligu prestunum hevur fingið brævt, har tær eru ávaraðar ímóti at gerast prestar, og eini 50 av teimum 1000 kvinnuligu prestunum í Danmark hava upplivað, at mannligir prestar hava beinleiðis sjikanerað tær ella roynt at venda hugburðinum hjá meinigheitini ímóti teimum.

# Sjálvstýrisflokkurin liðugur at stilla upp

**Sjálvstýrisflokkurin hevur 17 valevni til løgtingsvalið í næsta mánaði**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fimm kvinnur og 12 mans stilla upp fyri Sjálvstýrisflokkin til komandi løgtingsval 19. januar. Á listanum eru kend fólk úr Sjálvstýrisflokkinum, men har eru eisini fleiri, ið hava stillað upp fyri aðrar flokkar – og sum hava sitið á tingi sum varafólk fyri aðrar flokkar.

Rúna Sivertsen sat í seks ár á tingi sum varafólk fyri Anfinn Kallsberg, vald fyri Fólkaflokkin í Norðoya valdømi.

Heðin D. Poulsen í Havn hevur havt sæti sum varamaður á tingi fyri Fólkaflokkin í Suðurstreymoy.

Kári Petersen hevur fleiri ferðir stillað upp fyri Javnaðarflokkin, bæði í Norðstreymoy og í Suðurstreymoy. Hann hevur fleiri ferðir havt sæti á tingi sum varamaður fyri Thomas Arabo.

Seinasti uppstillingarfundur hjá Sjálvstýrisflokkinum varð hildin sum felags 3. uppstillingarfundur í Kvinnufelaghúsunum á Glyvrum 21. desember. Landsnevndin og valfeløgini hjá Sjálvstýrisflokkinum høvdu eftir økisfundir gjørt síni tilmæli, og varð listin staðfestur.

Sjálvstýrisflokkurin hevur eitt umboð á tingi, Kára P. Højgaard, og sambært veljarakanningum sær ikki út til, at hetta fer at broytast. Flokkurin hevur tó havt tvey og onkuntíð trý fólk á tingi seinnu árini. Síðan flokkurin fór í tvíningar fyri seinna heimsbardaga, hevur hann altíð verið millum minstu flokkar á tingi.

Tey 17 valevnini á sjálvstýrislistanum eru:

*Alis Højsted, lærari í Funningi*
*Dánjal Petur (Piddi) Hansen, stjóri í Saltangará*
*Eileen Sandá, málfrøðingur í Vági*
*Eyðun Elttør, maskinmeistari í Klaksvík*
*Hans Blåsvær, teldufrøðingur í Havn*
*Heðin D. Poulsen, løgfrøðingur í Havn*
*Kári á Rógvi, lógkønur í Havn*
*Kári P. Højgaard, løgtingsmaður í Saltangará*
*Kári Petersen, búskaparfrøðingur í Havn*
*Karl A. Olsen, borgarstjóri í Vestmanna*
*Kristian Eli (Gissa) Zachariassen, býráðslimur í Klaksvík*
*Kristina Toftegaard Larsen, stovnsleiðari í Fuglafirði*
*Ronald Poulsen, byggifrøðingur í Havn*
*Rúna Sivertsen, miðlafólk í Streymnesi*
*Sámal Petur í Grund, skipari í Søldarfirði*
*Súsanna Mortensen, rektari í Havn*
*Sven Dahl, plátusmiður í Klaksvík*


LEIRVÍKAR KOMMUNA SØKIR

**starvsfólk til teknisku umsiting**



Søkt verður eftir fólki til felags teknisku umsitingina hjá Leirvíkar og Gøtu kommunum at byrja 1. februar 2008 ella skjótast tilber.

**Arbeiðsuppgávur:**
- Umsiting av tekniskum viðurskiftum hjá kommununum
- Málsviðgerð
- Fyrireiking av málum til teknisku nevndirnar
- Skráseting
- Evt. Projektering, byggileiðsla og fakeftirlit
- Aðrar fyrifallandi uppgávur

**Kommunan:**
Leirvíkar og Gøtu kommuna kunnu bjóða tær eitt fakliga spennandi og fjølbroytt starv í einum vøkrum umhvørvi.

Góðir møguleikar eru fyri menning persónliga og fakliga við skeiðvirksemi og møguligum eftirútbúgvingum.

Frá 1. januar 2009 leggja Leirvíkar og Gøtu kommuna saman í Eysturkommunu við heimstaði í Norðragøtu.

**Førleiki:**
Vit sóknast eftir einum arkitekti, byggifrøðingi, byggiteknikara, verkfrøðingi ella einum persóni, sum hevur aðra hóskandi tekniska útbúging.
Royndir innan almenna umsiting eru ein fyrimunur.

**Løn:**
Lønin verður goldin sambært galdandi sáttmála við avvarðandi fakfelag.

**Upplýsingar og umsókn:**
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Leirvíkar Kommunu, tel 443006, ella til Andreas Andreasen, tekniskan leiðara, tel 596040.

Umsókn við avritum av prógvum og ummælum skal verða okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 14. januar 2008.

Umsóknir skulu sendast til:
Leirvíkar Kommuna
Kulibakki 15,
Postboks 42
FO-520 Leirvík

www.leirvik.fo

Leirvíkar Kommuna

KREA